## Minni fiskur - størri virði

Teir báðar fyrstu mánaðirnar í ár vórðu 17.000 tons seld á teimum íslendsku fiskamarknaðunum. Somu mánaðir í 2009 seldu marknaðirnir 20.000 tons. Men hóast nøgdin minkaði, vaks søluvirðið. Morgunblaðið skrivar, at í januar og februar í ár seldu marknaðirnir fyri 4.759 milliónir krónur ímóti 3.625 milliónum krónum somu mánaðir í 2008. Við øðrum orðum var nøgdin teir báðar fyrstu mánaðirnar í ár 15 prosent minni enn somu mánaðir í fjør, meðan søluvirðið var 30 prosent størri í ár.



## Ikki tikin á lívi

Hóast USA hevur lovað 25 milliónir dollarar í finningarløn, um onkur vil avdúka upplýsingar, sum kunnu gera, at Osama bin Laden verður tikin, so er eingin fallin fyri freistingini enn. Amerikanski løgmálaráðharrin, Eric H. Holder, ásannar eisini, at leiðarin í al-Qaeda kemur ongantíð fyri ein amerikanskan dómstól. Í einari hoyring í Kongressini í gjár segði Holder, at bin Laden verður skotin, áðrenn hann verður tikin. Tað verða annaðhvørt okkara menn ella hansara egnu, sum skjóta hann, segði ráðharrin.

# 88 børn skiftast um

**Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, hevur lovað, at øll verða nøgd við garðin á ringast umtókta dagstovninum í Havn í heyst. Men tað er ikki bara við Landavegin, at børnini hava óssaligar umstøður. Á dagstovninum í Hoyvík eru tríggjar reiggjur til 88 børn og millum annað tað skapar stóra ónøgd**

DAGSTOVNUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Foreldur at børnum á dagstovninum í Hoyvík eru misnøgd við, at so fáar leikur eru til børnini. Í garðinum eru nakrir sandkassar, ein bátur, sum skal takast burtur, tí hann ikki er tryggur, umframt tríggjar reiggjur til tey 88 børnini á stovninum*

Ringast umtókti dagstovnurin í Tórshavnar kommunu, sambært nøgdsemiskanning, sum Sosialurin avdúkaði 12. februar, var dagstovnurin við Landavegin.

Kirstin Djurhuus, leiðari á stovninum við Landavegin, segði tá við Sosialin, at garðurin hjá dagstovninum helst var ein av høvuðsorsøkunum til, at stovnurin fekk so keðiligt úrslit.

Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, lovaði ein lítlan mánað aftaná í tíðindunum á Rás2, at í heyst verður ongin ónøgdur við garðin við Landavegin.

### Ónøgd foreldur

Men tað er ikki bara á dagstovninum við landavegin, at standurin er langt frá góður. Sosialurin hevur verið í samband við mammur at børnum á Dagstovninum í Hoyvík, og tær kenna seg veruliga snýttar.

Rúna Dalsgarð hevur eina fimm ára gamla dóttir á stovninum, og hon hevur nógv at fýlast á kringumstøðurnar á stovninum.

– Eg má beinanvegin siga, at tey, sum arbeiða har gera eitt megnar arbeiði, men garðurin er út av lagi vánaligur. Har er sandur, nakrir mánabilar og tríggjar reiggjur til 88 børn. Har var einaferð ein skreiðibreyt, men so var hon ikki nóg trygg longur, so hon varð tikin burtur. Men onki er komið í staðin. Eg havi havt børn á stovninum í sjey ár, har er onki nýtt komið og onki málað alla ta tíðina, greiðir Rúna Dalsgarð frá.

Hon leggur afturat, at tvær av hurðunum eru so trekar, at regnar tað eitt sindur, so fáa børnini karm, áðrenn nakar kann koma at hjálpa teimum at lata hurðina upp.

– Har vóru úthang gjørd við hurðarnar fyri tveimum árum síðan, men tað er láturligt, hvussu lítil tey eru, sigur Rúna Dalsgarð.

Einn onnur mamma er Heidi Simonsen, sum hevur tvey børn, eina trý ára gamla gentu og ein seks ára gamlan son, á stovninum.

– Garðurin er als ikki nøktandi. Har eru so nógvar ábøtur, sum skulu gerast, og har mangla fasilitetir. Og so eru úthurðarnar øgiliga trekar og vánaligar, umframt, at einar trappur, sum vit plaga at brúka eru fullar í holum, sigur Heidi Simonsen.

Dagstovnurin í Hoyvík endaði í nøkulunda í miðjuni í nøgdsemiskanningini, og sambært Heidi Simonsen er tað bara starvsfólkunum fyri at takka.

– Eg svaraði uppá hetta við garðinum, men starvsfólkini eru ófør, sigur Heidi Simonsen.

Heidi Simonsen leggur afturat, at hon sjálv hevur roynt at seta seg í samband við kommununa, og haðani hevur hon bara fingið at vita, at tey hjá kommununi ikki hava mett garðin uppi í Hoyvík at vera so ringan og at stovnurin liggur høgt á listanum til ábøtur.

– Men har hendir bara onki. Gott nokk fer sonurin av stovninum skjótt, men dóttirin skal vera har í fleiri ár, so eg vóni bara, at okkurt hendir, og eg hugsi um at ringja aftur til kommununa, sigur Heidi Simonsen.

### Batar í væntu

Anna Maria Antoniussen, leiðari á dagstovninum í